From: Joannes Dali <joannes.dali@gmail.com>
Sent: týsdagur, 6. januar 2026 15:16
To: Journalin hjá LMS <lms@lms.fo>; Løgting <logting@logting.fo>; Landsverk <lv@lv.fo>; Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Subject: Fwd: Uppskot eg havi sent til Nýskipananevndini.

Til Løgtingsins fíggjarnevnd, og Løgmannsskrivstovuna, Føroya Løgting, Landsverk og onnur.

Vinaliga
Jóannes í Dali

---------- Forwarded message ---------
From: **Joannes Dali** <joannes.dali@gmail.com>
Date: Sun, Dec 21, 2025 at 11:39 PM
Subject: Uppskot eg havi sent til Nýskipananevndini.
To: <johnnyg@setur.fo>, <landsbankin@landsbankin.fo>, <malan@landsbankin.fo>
Cc: <math@lv.fo>, <HansE@setur.fo>

Hey Johnny og tit í Búskaparráðnum.

Tá tú í KVF hevur tosað um Nýskipananevndina og okkara vælútbygda samferðslukervi, hevur tú fleiri ferðir nevnt samanlegging / partvís niðurlegging av Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og tá hevur tað undrað meg, at tú ikki tá eisini hevur nevnt teir møguleikarnar sum nú liggja í Sandoyartunnlinum, og at sambandið við Suðuroynna longu fyri tveimum árum síðani átti at verið effektiviserað og rationaliserað, og um ikki annað – í stigum - lutvist umløgd.

Av ymiskum orsøkum – har flest allar ikki hava støði í realitetir - hevur man enn ikki gjørt nyttu av Sandoyartunnlinum og set í verk eina rutu millum Sand og Hvalba.

Tá tað snýr seg um partafelagið “Suðuroyartunnilin”, hevur tað - av somu orsøkum – og at eitt partafelag ikki hevur “skyldu” at taka hædd fyri øðrum enn sær sjálvum, ei heldur tikið hædd fyri tí, at Suðuroyggin hevur ein átrokandi tørv á størri kapaciteti (einamest um vikuskiftið).

Fakta er, at Suðuroyartingfólk óttast, at um eitt fergusamband verður veruleiki, so verður eingin tunnil.

Hesin óttin gerð, at ein loynilig óformell strategi uppstendur, sum er púra óviðkomandi og sum er sjálvstyrkjandi og sjálvdestruktiv, m.a. tí tað verður neyðugt við einari kapacitetsøkjan langt áðrenn tunnilin er liðugur, og sum serliga suðuroyartingfólk av somu orsøk – og tilvitað - nokta at forhalda seg til.

Alment sigur man einans, at man hevur ta vón, at Smyril skal halda nøkur ár aftrat, um hann fær eina høvuðsumvæling.

Við øðrum orðum, vil man tiga um, og dylja veruligu umstøðurnar, sum prógvar at samlaða suðuroyartunnilsverkætlanin hjá Tunnilsfelagnum er fíggjarlig óforsvarlig at gjøgnumføra, í tí líki sum Landsstýrið ætlar, og vil steðga á at seta krøv viðv. tey átrokandi betringarnar, til aftaná at "suðuroyartunnilin" er samtyktur.

Eg vísti longu í 2014 m.a. Landsstýrinum og Landsverk á, at ein komandi Sandoyartunnil vildi gera tað møguligt, at ein komandi Suðuroyartunnil kundi fremjast sum ein líðandi umlegging, og at hendan umleggingin kundi fremjast í stigum, har liðugtgerðin av hvørjum stigi sær, bæði betraði kapacitetin og tænastuna, og minkaði samstundis um árligu útreiðslurnar hjá SSL, umframt at inntøkurnar hjá Sandoyartunnilin vildi vaksa, sum við hesum vildi gera tað minni tyngjandi at upptaka lán til høvuðsarbeiðini, tá tey skuldu byrja, og sum til tað tíð, ikki vildi blíva ein óyvirkomilig fíggjarlig byrða.

Landsverk nevndi hetta í einari samferðsluætlan, har tey projekteraði eina byrging til Skúvoy, so sum eg hevði víst teimum á kundi gerast, tí har var so grunt, men seinni vildi man av umhvørvisorsøkum ikki leggja ein nýggjan landsveg tætt við Stóravatn, og slepti tí henda gylta møguleikan at kunna fremja suðuroyartunnilsætlanina, sum eina umlegging í stigum.

Nú hava 5 suðuroyartingfólk so sett út í kortið, at tær 5 mia., sum tunnilin er mettur at kosta, fyrst skulu koma til nyttu um 15 ár.

Umframt at føroyskir arbeiðstakarar ikki skulu kunna luttaka.

Tað er partar av hesum – upprunaligu - fyrsta átakið í einari verkætlan, sum ger nyttu av Sandoyartunnilin, sum eg havi sent uppskot um til Nýskipanarnevndina, sum eg sendi tær samstundis hesum skrivi.

Hendan meira enn 10 ára gamla verkætlanin hjá mær – sum fyri ein stóran part tók støði í tí tunnilsgrótinum sum var á goymslu á landi - fekk í ár enn betri fyritreytir, tá omanlop var í Skúgvi, har tað slepst eftir hesum gróti alt summarið, og sum kann gera tað landfast millum Sandoy og Skúvoy, tí har er – sum sagt - sera grunt (einans 11 m. í miðjuni).

Við hesum átaki eru allar forðingar og ivamál beindar av vegnum fyri einari víðari boring úr Skúvoy.

Í mun til eitt fergusamband Sand – Hvalba, kann eg nevna, at Jan Hammer Egholm greiddi í D&V frá hvussu man nú – frammanundan – kundi síggja hvussu sjógvurin skikkaði sær, soleiðis at tey sum eru minni sjósterk, kunnu fara við Smyril heldur enn nýggju leiðina millum Sand og Hvalba.

At enda kann eg viðmerkja, at tá Løgmaður leggur lógaruppskot fram fyri "at finna ein prís" uppá ein suðuroyartunnil, "við hjálp av einum útboði", so er tað eitt valg ímillum at taka av einum innkomnum tilboði, ella tveita 70 milliónir burtur, tí príslegurnar kunnu broytast munandi frá ári til ár.

At samanlíkna tað við ein tveytrinsraket, er kanska ikki heilt av leið (men avgjørt ikki í tí andanum tað var framborið), tí enn er tað ikki komið fyri, at annað trinið á eina rakett IKKI var ætlað at tendrast, men var tilætlað at detta í havið, um annað trinið var ov dýrt at senda víðari.

Prísir á entreprenørarbeiðir eru ógvuliga ymisk frá ár til ár, og er alt eftir hvussu "svangir" entreprenørarnir eru.

So tveytrinsrakettina hjá Landsstýrinum kann einans hava til endamáls, at verkætlanin er tvíngin at helda fram, ella at 70 mill. vera tveittar burtur.

Fyri 70 mill. kundi landið keypt eina nýggja 50 m. langa fergu – størri enn Teistin - sum tekur 40 bilar, ella kanska tvær brúktar fergur í somu støddd.

Í dag hava vit ikki ráð til at fara undir ein suðuroyartunnil har ágóðin fyrst kemur um 15 ár, og vit hava enn minni ráð til at tveita 70 mill. burtur fyri einans at finna "ein prís", og so keypa systurskip til Smyril.

Har finnast verkfrøðingarfeløg, sum hava tað sum sergrein, at kanna marknaðin og gera metingar um nær best er at gera sáttmálar í tey ymsu londunum, út frá forprojektum, og Norconsult hevur longu nú gjørt eitt slíkt projekt fyri tunnilsfelagið, og tað hevði verið nakað sum hevði verið til nyttu, tí tá fekk man eisini eina vurdering av nær best var at gera størri verkætlanar.

Vinaliga

Jóannes í Dali